

# Russland, NATO og kríggið í Ukraina

## Vísindavøkan 2024

## Hans Andrias Sølvará

***Úr bókini***

Søgan hjá Ukraina í Sovjetsamveldinum byrjaði við kúgan og russifisering av landinum. Í 1932-1933 fór beinleiðis fram eitt fólkamorð – Holodomor – í „evropeiska breyðkamarinum", har endamálið var at niðurberja alla mótstøðu móti russifiseringsætlanunum úr Moskva. Í Ukraina varð hungursneyð, og fýra milliónir ukrainar doyðu av tí, ið Anne Applebaum kallaði fyri „Stalin'sa kríggj ímóti Ukraina".

Hendan søgan um Holodomor er eisini brúkt samleikaskapandi í ukrainskari minnissøgu í 21. øld, og í 2022-2023 sat ein annar leiðari í Kreml, sum bumbaði stóru ukrainsku korngoymslurnar í Odesa. Tað var aftur vandi fyri mannaskaptari hungursneyð, nú „evropeiska breyðkamarið" einaferð enn við vilja varð oyðilagt við tí ætlan at kúga og russifisera Ukraina. Hetta, sum Stalin setti í verk í 1932-1933, tað endurtók Putin í 2022-2023. Bæði ukrainska inngongdin og útgongdin úr sovjetiska økinum líkjast fólkamorði.

fróðskapur

ISBN 978-99972-55-20-4

9 789997 255204

FRÁ KUWAIT TIL KYIV

Hans Andrias Sølvará

# FRÁ KUWAIT TIL KYIV

## TVÆR HEIMSMYNDIR OG RUSSISKU INNRÁSIRNAR Í UKRAINA




Hans Andrias Sølvará

# Spurningur

Hvørjar eru millum høvuðsgrundirnar til tær tríggjar russisku innrásirnar í Ukraina frá 2014 til 2022?




Bucha norðanfyri Kiev í apríl 2022, tá russiski herurin hevði tikið seg aftur úr økinum

# Russisku innrásirnar í Ukraina í 2014



# Russiska innrásin í Ukraina 2022-23



# Tvær hypotesur




Hvør partur hóttir hvønn?

Hvør partur er ágangandi og hvør partur verjir seg?

- Tað er víðkanin av NATO eystureftir síðan 1991, sum hevur havt við sær, at Russland er vorðið so ágangandi móti sínum grannum

- Tað er strembanin í Kreml/Moskva síðan 1991 til aftur at fáa ræði á øllum tí “post-sovjetiska økinum”, sum hevur skapt óttan fyri Russlandi

# NATO víðkanin eystureftir



# Teori



Henry Kissinger, trygdarpolitiskur ráðgevi hjá Richard Nixon og uttanríkisráðharri hjá Gerald Ford.

## Realisma

- Anarkistisk støða í stórpolitikki, har vald hevur avgerandi týdning, ikki altjóða stovnar, lóg, sáttmálar ella moralur
- Egin áhugamál stýra atferðini hjá londum í altjóða politikki
- Trygdartvístøðan – eitt verjuátak hjá einum landi kann vera skilt ágangandi av einum øðrum
- Skilt verður millum offensiva og defensiva realismu
- Demokratitesan – demokrati og trygdarpolitikkur hanga saman – kann kombinerast við realismu
- Innanhýsis viðurskifti í einum landi hava týdning fyri atferðina móti øðrum londum
- Ein unipolar heimsskipan (USA) mennist í 1990 eftir bipolaru heimsskipan (USA – USSR) undir kalda krígnum

# Empiri – hvør óttast hvønn í eysturevropa?



Manfred Wörner (vm), sum var NATO aðalskrivari, og Lech Walesa, leiðari fyri Solidaritet, sum gjørdist forseti í Póllandi eftir kalda kríggið. Myndin er frá vitjan í Gdansk í Póllandi 13. september 1990.

- Holodomor í 1932-1933 og ukrainskur uppreistur til 1950-árini
- Sovjetiskar innrásir í 1956 (Ungarn), 1968 (Kekkoslovakia)
- Týska sameiningin innan NATO í september 1990
- Sovjetiski herurin leggur uppí í Vilnius í Litava í januar í 1991
- Sovjetsamveldið og Warszawa-samgongan detta sundur í 1991, tá kúgaði sovjetisk lýðveldi og lond í eysturevropa gjørdust fræls
- Oktobur-kvettið í Moskva 1993, duman sett til viks, sterkur forseti
- Kreml leggur seg út í viðurskifti hjá grannaum í 1991, 1992, 1994
- Eysturevropeiskt trýst beinanvegin lagt á NATO um at fáa limaskap
- Budapest-sáttmálin í 1994 um ukrainsku kjarnorkuvápnini
- NATO-Russia Founding Act í 1997 og Krim-avtalan í 1997
- NATO-víðkanin eystureftir byrjaði í 1999 (Ungarn, Kekkia og Pólland), og helt fram í 2004 (m.a. Estland. Letland og Litava)
- Ukraina og Georgia søkja um NATO limaskap í apríl í 2008

# Nakrar avgerandi hendingar



George W. Bush, forseti í USA frá 2001-2009, vildi í apríl 2008 ganga umsóknunum frá Ukraina og Georgia um NATO limaskap á møti

- NATO og borgarakríggið í Jugoslavia – bumbaðu Serbia í 1999
- USA álopið 11. september 2001 – innrás í Afghanistan
- USA og sameind gera í 2003 innrás í Irak
- Russland ger innrás í Georgia í august 2008
- Putin hóttir í november 2013 Ukraina til at vraka eina fríhandilsavtalu við ES. Stór mótmæli í Ukraina, Russland ger í februar 2014 innrás á Krim, sum verður limað inn, og í Donbas
- Fyri fyrstu ferð er stór undirtøka fyri NATO-limaskapi í Ukraina
- Hermótini í Donbas verða læst føst longu í 2015, men í 2022 ger Russland eina fulla innrás í Ukraina – limar inn stór øki. Eisini henda innrásin, sum var í stríð við altjóða rætt, miseydnast
- Uttanveltaðu Svøríki og Finnland søkja í 2022 NATO-limaskap

# Niðurstøður – unipolara heimsskipanin um at detta sundur



- Russland hevur síðan kalda kríggið endaði grundleggjandi ynskt at endurreisa sítt politiska og búskaparliga vald í “post sovjetiska økinum”
- Russland hevur rikið lond í eysturevropa (fyrrverandi sovjetisk lýðveldi, fyrrverandi limir í Warszawa-samgonguni og óheft evropeisk lond) upp í NATO, meðan NATO í stóran mun hevur verið trýst til at góðtaka hetta
- Vesturheimurin, serliga USA, hevur í árunum aftaná 2000 ført ein einvísan og óhepnan uttanríkispolitikk, sum hevur skapt stóra mótstøðu aðrastaðni
- Ítøkiliga snýr hetta seg um geo-politiskt og geo-økonomiskt vald um serliga – men ikki bert – eysturevropa/Svartahavið, har mótpartarnir eru demokratisk lond vestanfyri og autoriter lond eystanfyri
- NATO hevur ongantíð hótt Russland, men Kreml loyvir ikki londum í “post-sovjetiska økinum” at venda seg vestureftir og gera seg leys av Moskva

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

VITAN ER PALLURIN FORVITNI ER DRÍVMEGIN